# Nógv verður gjørt fyri at hjálpa

**Suni Winther sigur, at eins umráðandi, sum tað er at senda fyrstu hjálpina beinanvegin til kreppuraktu økini – líka so umráðandi er tað, at ein partur av hjálpini verður ógvuliga væl umhugsaður, tí tá er møguleikin bestur fyri, at hjálpin kemur, har tørvurin er størstur**

HJÁLPARARBEIÐI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Flóðaldan, sum rakti landsynningspartin av Asiu, gjørdi feigdina um seg. Nú stendur heimurin saman um at veita hjálp í stóru neyðini*

Formaðurin í føroysku deildini hjá Reyða Krossi, Suni Winther, sigur, at nógv gongur fyri seg í løtuni kring um í Føroyum, og at nógv fólk hava víst áhuga fyri at stuðla tí arbeiði, sum Reyði Krossur ger til tess at hjálpa vanlukkuraktu økjunum í landsynningspartinum av Asiu.

- Aftrat tí, sum Reyði Krossur ger – við hjálp frá góðum fólki kring landið, fer Neyðhjálp Fólkakirkjunar at savna inn pening í kirkjunum, og Frelsunarherurin hevur eisini fingið áheitan úr London um at royna at savna inn pening inn til hjálpararbeiði.

Suni Winther sigur, at feløg hava stovnað kontoir, og nógv privatfólk hava sett pening á konto til arbeiðið.

## Innsavning

Formaðurin í føroysku deildini hjá Reyða Krossi sigur, at nú verður miðjað eftir at hava eina landsinnsavning komandi leygardag, og her hava nógv feløg og felagsskapir boðið sær á ymiskan hátt at hjálpa til við samskiping og innsavning.

- Sunnudagin komandi er so eisini ætlanin at hava eina konsert í Út og SvF, sum Teitur Lassen og Gissur Patursson skipa fyri, sigur hann.

## 1 miljón til tjøld

Suni Winther sigur, at tá ið slíkar ræðuligar vanlukkur henda, er umráðandi, at fyrsta hjálpin kemur skjótt.

- Vit hava brúkt eina miljón til hetta arbeiði, tá ið vit rindaðu tjøldini, sum send vórðu avstað við tí eini lastini, sum fór 30. desember.

Hann sigur, at føroyska deildin hjá Reyða Krossi hevur fingið tær fyrstu 300.000 krónurnar, sum landið letur, umframt 100.000 krónur frá Skótahjálpini.

- Kemur restin av upphæddini, sum landið stuðlar við, í dag, fer umleið ein miljón avstað í dag, segði Suni Winther, tá ið vit høvdu hann í telefonini í gjár.

## Nú og seinni

Hann vísti á, at eins umráðandi, sum tað er at senda fyrstu hjálpina beinanvegin til kreppuraktu økini – líka so umráðandi er tað, at ein partur av hjálpini verður ógvuliga væl umhugsaður.

- Tá er møguleikin bestur fyri, at hjálpin kemur, har tørvurin er størstur, sigur hann.

# Arbeiðarafelag stuðlar hjálpararbeiðnum

**- Eg vóni, at hetta er byrjanin til, at fleiri arbeiðarafeløg eisini fara at stuðla hjálpararbeiðinum, sigur Suni Winther, formaður í Reyða Krossi, Føroya Deild**

NEYÐHJÁLP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tofta Arbeiðsmannafelag hevur samtykt at veita 5.000 krónur í stuðli til hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi í sambandi við herviligu flóðalduna og tær ræðuligu vanlukkur, sum hendan hevur elvt í landsynningspartinum av Asiu.

Harry Benjaminsen, formaður í arbeiðsmannafelagnum, sigur, at nevndin er samd um at stuðla hjálpararbeiðinum, og hann vónar, at onnur feløg eisini fara at stuðla arbeiðinum.

Ætlandi vórðu tær 5.000 krónurnar, sum Tofta Arbeiðsmannafelag veitir Reyða Krossi, formelt handaðar á skrivstovuni hjá Reyða Krossi, Føroya Deild, seinnapartin í gjár.

## Fyrsta felag

Suni Winther, formaður í føroysku deildini hjá Reyða Krossi er fegin um, at eisini arbeiðafeløg vilja stuðla hjálpararbeiðinum.

- Eg vóni, at hetta er byrjanin til, at fleiri feløg fara at fylgja Tofta Arbeiðsmannafelag og stuðla innsavningini til vanlukkuraktu økini, sigur Suni Winther.



*Suni Winther, formaðurin í føroya deildini hjá Reyða Krossi, fegnast um, at arbeiðarafeløg nú eisini eru farin at stuðla innsavningini til vanlukkuraktu økini í landsyningspartinum av Asiu*

# Fjórðings millión til B71

Herfyri skipaði Stuðulsfelagið hjá B71 fyri eini sonevndari »steðga og vinn« kapping. Hendan varð skipað soleiðis, at ein bilur við 5 litrum av bensini í tanganum varð sendur á rundferð kring Sandsvatn. Økið kring vatnið varð so býtt í teigar, sum fólk kundu keypa, og vinnarin av bilinum var so tann, sum hevði teigin, har bilurin steðgaði.

Og einki er at ivast í, at áhugin fyri tiltakinum var stórur. Nú B71 fylti 35 ár, kundi stuðulsfelagið handað felagnum ein kekk upp á ikki minni enn 250.000 kr., og sum vera man, so eru tey í felagnum væl nøgd um hetta.



*Ottar Hentze handara her formanninum í B71, Eli Hentze, stóra kekkin við stóru upphæddini*
*Mynd: www.b71-sandoy.com*

- Vit seldu 4.440 seðlar, og hartil varð so talan eisini um aðrar inntøkur av ymsum slag. Útreiðslur vóru sjálvandi eisini, men vit kunnu so í øllum førum staðfesta, at avlopið var heilt fitt, sigur Ottar Hentze, sum er formaður í Stuðulsfelagnum hjá B71.

Hann sigur, at enn er endaliga úrslitið av tiltakinum ikki heilt endaliga gjørt upp, og avlopið verður helst eitt vet størri enn kekkurin. Men sum hann sigur, so hildu tey føðingardagin hjá felagnum vera eitt hóskiligt høvi til handan av kekkinum.

**-jm**